# Føroya Bjór Simultan



*Í fjør vórðu tað teir báðir, Magni og Allan, sum vunnu Føroya Bjór Simultan kappingina*

**Árliga Føroya Bjór Simultan kappingin í Bridge, verður leikt leygardagin**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Kappingin, ið er tann stórsta og best umtókta kappingin, sum FBS, sera væl stuðla av Føroya Bjór, skipar fyri, verður leikt kring alt landið.

Luttøku tali í fjørð var sera høgt, tá leiktu omanfyri 100 spælarar. Føroya Bridge Samband miðar í ár at koma upp á 150 spælarar.

Spælt verður í Bridgehúsinum í Havn, í skúlanum í Miðvági, í Bridgehúsinum í Vági, á matstovuni í Ítróttarhøllini á Kambsdali, í Bridgehølinum í Klaksvík

Kappingin er soleiðis skipað, at leikt verða somu spøl á øllum spælið støðunum. Ein vinnari verður sjálvandi fyrst funnin á hvørjum spælið stað sær, síðani verður gjørt upp fyri alt landið og ein samlaður vinnari verður soleiðis funnin. Tað skulu spælast ikki færri enn 27 á hvørjum spælistað og tað eru spøl 1 til og við 27, ið telja við í tí samlaðu uppgerðini. Føroya Bjór letur nógvar góðar vinningar til øll spælistøðini og til teir samlaðu vinnaranar.

Tilmelding er á staðnum.

# Eitt spæl

Dlr: West
Vul: None

QJ7
62
KQ842
K1093 A4
653 A8
A974 KQJ85
J6 A109
8652
109742
3
753

Vestan Norðan Eystan Sunnan
Pass ((( 1 kl(( 3 NT(((
All Pass(((
Útspæl(: ((hj4((( (((

Vit spæla parakapping, so yvirstikkini hava stóran týdning.

Um útspælið hevði verið kleyvari, so var ikki so nógv at skriva um. 11 stik høvdu komi av sær sjálvum.

Fyrsti hjartarin verður loraður og næsti tikin við essinum. Vit taka tvær ferðir rútara, og enda á borðinum. Nú spæla vit kleyvar drong til kong og ess. At enda spæla vit rútaran. Áðrenn tann síðsta er støðan:

Gev:Vest Q J 7
Hæt:None hj Q
rú
kl Q
sp QJ7
hj Q
rú
kl Q
sp K1093 A4
hj 6
rú 5
kl 109
sp 865
hj 109
rú
kl

Tann síðsti rútarin noyðir norðan at kasta sín hjartara og vit kunnu reisa kleyvarastikkið og hava reyst.

# Nocko takkar fyri seg



**Fyrrverandi HB-leikarin Nocko Jokovic hevur valt at gevast sum yrkisleikari**

Jokovic hevur seinastu tíðina verið knýttur at Randers FC, men hevur verið nógv darvaður av skaða.

– Eg havi dagliga pínu í fótinum, og tað ber ikki til hjá mær at halda fram sum fótbóltsspælari, sigur 31 ára gamli Nocko Jokovic.

Í sínari tíð sum yrkisleikari hevur Nocko Jokovci leikt við AGF, Silkeborg og Randers í Danmark, Livingston í Skotlandi og so við HB, sum hann vann føroyameistaraheitið við í 2002. Tað var einastu ferð, at Nocko Jokovic í sínari tíð sum yrkisleikari var við til at vinna eitt gullheiðursmerki. At Nocko Jokovic átti sín part í meistaraheitinum hjá HB tað árið er vist, tí í avgerandi dystinum móti NSÍ í Runavík, sum HB vann 2-0, skoraði Jokovic bæði málini.

**tn**

# Stór hondbóltskapping í Runavík

**Hondbóltsfelagið Tjaldur í Runavík fer fyrst í mars mánað at skipa fyri stórari kapping fyri yngru liðini**

HONDBÓLTSKAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kappingin fer fram í vikuskiftinum 5. og 6. mars, og genturnar kappast fyrra dagin, meðan dreingirnir kappast tann seinna.

### Øðrvísi reglar

Spælt verður í trimum aldursbólkum. Gentur og dreingir 10 ár, sum eru fødd 1994-1996, gentur og dreingir 12 ár, ið eru fødd 1992-1993, og tann elsti bólkurin er gentur og dreingir 14, sum eru fødd 1990-1991.

Spælt verður eftir galdandi reglum hjá HSF, men tó eru nakrar serliga reglur galdandi fyri kappingina.

Eitt nú er spælitíðin átta minuttir, og hvørt liðið kann hava átta leikarar. Tá ið farið verður undir endaspælið av kappingini, verður golden-goal reglan eisini við. Tað merkir, at stendur tað á jøvnum millum tvey lið, tá ið tíðin er farin, verður spælt viðari, til annað liðið skorar eitt sonevnt golden-goal.

Vinnandi liðini fær eitt gávukort upp á 1.500 krónur, og teir átta leikararnir fáa hvør sína persónliga gávu. Næstfremsta liðið fær 500 krónur umframt átta persónligar gávur, meðan triðfremsta liðið fær persónligar gávur til allar leikararnar.

Tilmeldingarfreistin er 11. februar, og luttøkugjaldið er 800 krónur fyri liðið. Tilmelding fer fram við at senda ein teldupost til tjaldur@tjaldur.fo.

# Kristoffur aftur í Chelsea

**Ungi klaksvíkingurin Kristoffur Jacobsen, sum herfyri var og royndarvandi í Chelsea, er í hesum aftur í enska stórfelagnum og roynur seg**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Alt bendir á, at tað gekk væl hjá 16 ára gamla KÍ-leikaranum, Kristoffur Jacobsen, sum herfyri var og royndarvandi í enska stórfelagnum Chelsea úr London. Tað gekk ikki lang tíð eftir heimkomuna til Klaksvíkar, so vóru aftur boð úr London um, at Chelsea fegin vildi hava Kristoffur á vitjan enn einaferð.

Kristoffur fór til Onglands sunnudagin, og í dag gongur leiðin so heimaftur. Enn er nakað tíðliga at spáa um møguleikarnar hjá Kristoffuri fyri at fáa ein sáttmála við enska felagið, men at teir vilja hava hann at koma enn ein túr til London, kundi bent á, at áhugin fyri unga klaksvíkinginum er stórur í Chelsea.

Ein av ungdómsvenjarunum í KÍ, Eyðun Klakstein, var við á fyrra túrinum hjá Kristoffur í Chelsea, og hann er ikki bilsin av, at onglendingarnir sendu boð eftir honum aftur. – Tað gekk sera væl hjá Kristoffur undir venjing, og hann tóktist verða heilt væl fyri, sigur Eyðun Klakstein.